J.nr.: 7382 K002

# Sáttmáli

Hesin sáttmáli er millum Føroya Fornminnissavn og Kvívíkar Kommunu.

Endamálið við sáttmálanum er at fáa fastar avtalur um mannagongd, í sambandi við viðlíkahaldi av eftirgjørdum fornminnum.

Føroya Fornminnissavn hevur, eftur lokna fornfrøðiliga rannsókn, valt at eftirgera leivdirnar av fornu búsetingini "Niðri á Toft" í Kvívík. Hetta arbeiðið er gjørt soleiðis, at flag er lagt omaná upprundligu veggirnar og smásteinur omaná gólvflánna. Í fjóspartinum er renna og básar uppbygdir.

Í samband við viðlíkahaldið av fornu búsetingini "Niðri á Toft", er fylgjandi avtala gjørd partanna millum:

1. Føroya Fornminnissavn hevur sett upp skelti, sum á føroyskum, donskum og enskum sigur frá, hvat fyri búseting talan er um og hvat er funnið. Her fyriliggur eisini tekning av toftunum.
2. Kvívíkar Kommuna tekur ábyrgdina av, at toftirnar verða røktar, tvs, at grasið verður sligið á økinum rundanum sjálvar toftirnar og á teimum flaglagdu veggjunum. At gólvini verða hildin rein fyri ókrút og at steinsetingar verða hildnar sjónligar. Mannagongdin hesum viðvíkjandi skal Føroya Fornminnissavn átaka sær at siga arbeiðsfólkinum frá.
3. Skuldi ivamál tikið seg upp setir Kvívíkar Kommuna seg í samband við Føroya Fornminnissavn, soleiðis at hesi kunnu verða greidd.
4. Føroya Fornminnissavn vitjar á staðnum á hvørjum ári, fyri at meta um alt er í lagi.

Hoyvík hin 27. juni 2001

Kirstin Eliasen

Føroya Fornminnissavn
Kirstin Eliasen
landsantikvarur, vik.

Kvívík, hin

Heini Holm

Kvívíkar Kommuna
Heini Holm
Borgarstjóri